Leikrit



# Jólastákan hjá vættrahúskinum

Landsmiðstøðin

**Fororð**

"Jólastákan hjá vættrahúskinum" er in lítil sangleikur skrivaður fyri børn. Leikurin er gjørdur við barnakórum og teimum smáu flokkunum í huga.

Sangleikurin er einfald tala, einrøddaður sangum og sjálvandi leikur á palli og einfaldur dansur. Fylgispælið er hugsað sum klaver, men kan sjálvandi eisini vera við t.d. gittar, floytu og kontrabassi.

Vættrar og trøll hava verið íblástrarkeldan ígjøgnum øldir. Hugsað bara um Theodor Kittelsen, Edvard Grieg og Johan Halvorsen. Hesar undarligu verurnar, vættrar og trøll, hava, hvar tær so enn halda til, glett mong bæði stór og smá.

Hesaferð skulu vit hitta tey langt inni í Vættraskóginum heima hjá vættrapápanum og vættramammuni og øllum vættrabørnunum. Hetta er kvøldið frammanundan kvøldinum – nevniliga tollaksmessukvøld. Sum vanligt hevur vættrahúskið úr at gera við teimum seinastu jólafyrireikingunum. Mitt í øllum stákinum fáa tey vitjan. Vættragumman við sínari floytu, eitt trøllahúski og nakrar mýs. Hvat so kemur burtur úr einari slíkari vitjan, ja, tað mugu tit so fáa fram.

Oppsal. St. Hans 1987

Stein Skøyeneie

# JÓLASTÁKAN HJÁ VÆTTRAHÚSKINUM - EIN SANGLEIKUR.

**Tey leikandi:**

| | |
|---|---|
| Vættrapápin (VP). | Trampus. |
| Vættramamman (VM). | Trumsa. |
| 7 vættrabørn (VB) | Gamlatrøll. |
| VÆTTRAGUMMAN (VG). | Trøllabørn. |
| 3 piparkøkumenn. | Nakrar mýs. |

---

Útgerð til leikin:
Vættrastova við:
- borði og 7 stólum, nógvum jólapakkum, nøkrum sekkjum, einum góðum lenistóli, nakað av soviplássi og annað sum kann hugna um eina jólastovu.

Eina gandafloytu, í minsta lagi 1o piparnøtir (ella tílíkt), eina fjósalykt - og sjálvandi búnar.



PALLUR 1

(Vættrabørnini sita við borðið og kýta seg at fáa jólagávurnar lidnar. Vættramamman hjálpir til og pápin situr ílenistólinum og lesur vættratíðindi).

VP[illegible]: Nei, mín sann. Nú fara teir at bora eitt hol undir Vestmannasund...Tá tað er liðugt, kunnu vit jú fara vastur at vitja ommusysti í Bø.

VB1: Tað er alt ov langt at ganga. Eg vil nógv heldur vera her á Selatræ. Her eru trø.

VB2: Ja, alla aðrastaðni er so kalt og bert.

VB3: Um teir nú høvdu planta trø í Kvívík, so kundu vit gist har á vegnum, ha??

VM: Haaaar? Nei....tað bera tos og møsn. Komi nú heldur og geri nyttu, so vit fáa gávurnar liðnar. Syngja vit afturvið gongur tað bæði léttari og skjótari. ( hon byrjar: Vit.... (hini taka undir)).

SANGUR: Viteru eitt vættrahúski.

NIÐURLAG: Vit eru eitt vættrahúski, hygg stovan so hugnalig er. Her trívast vit gomul sum ung, tí hetta er okkara lítla verð.

1. Vit arbeiða tíðliga, vit arbeiða seint,
   tí húsið skal vera reint.

NL.

2. Við nál og við saksi og hamara, tong,
   fæst arbeiðið skjótt frá hond.

NL.



VM: Hugsið tykkum, nú eru longu jól aftur.

VP: Ja, sum tíðin gongur skjótt.

VB 1: Eg haldi, tað er so stutt síðan vit sótu og gjørdu jólagávur.

VB 2: - og bakaðu piparnøtir,

VB 3: - og stoyttu jólaljós,

VB 4: -og prýddu jólatræið,

VB 5: - og sungu jólasangir.

VM: Ja, tit hava púra rætt, og nú eru jólini aftur í hondum.

SANGUR: Jólini í hondum eru.




1. Jólini í hondum eru
   gleðin allarmest.
   Teimum heilsu berið:Ver
   vælkomin jólafest.

2. Koma jól við gávum góðum,
   okkum dámar best:
   Ljós og gleði, jólafrið.
   Vælkomin jólafest.

3. Okkar vættrahúskið,
   eins og fólk úr eyst í vest.
   Gleðiliga heilsa tær:
   Vælkomin jólafest.

VP: ( stendur og hyggur at gávunum)

Hmm...nú vóni eg ikki at vit hava gloymt nakran.

VB 6: Nei vættrapápi, her er nakað til øll,bæði stór og smá

VP: So er alt í lagi.A jólum mugu øll fáa gávu.

VB 7: Halda tit, teimum fer at dáma gávurnar?

VM: Tað vóni eg, tí í ár hava vit gjørt okkum serliga góðan ómak.

VB 7: Eg haldi, at vit hava gjørt nógvar fínar gávur.

SANGUR: Her í hesi vættrastovuni.




1. Her í hesi vættrastovuni,
   gera gávur til at gleða teg.
   Nakrar til tey stóru, nakrar fyri smá.
   Øll børn sum vit kenna, skulu onkra gávu fá.

2. Dukkur, kjólar, vakrar hattar við,
   hús og vognar standa lið um lið.
   Sært tu´hatta lambið, og ein vakran hest.
   Kanska fært tú gávu tú tær ynskir allarmest.

3. Jólagávur ynskja øll jú sær,
   um í ár vit vættrar gloymdu tær -

VB 6:(sigur)- nei! tað mugu vit ikki, tí...

(syngja) øll tey mundu hildið, at vit vóru ør.

Best man vera, at vit gera líka sum í fjør.



PALLUR 3:

(bankar á dyrnar)

VB 1: Hvørman tað vera sum kemur nú?

VG: Góðan dag - góðan dag øll somul.

VB 2: VÆTTRAGUMMA! HEY!

VB 3: Taðvar gott at tú komst at vitja.

VG: Ja, nú er langt síðan seinast.

VP: Kom innar og fá tær ein sess.

VB 4: Hevur tú gandafloytuna við tær?

VG: Sjálvandi! Vættragummur hava altíð eina gandafloytu hjá sær. (tekur floytuna fram) Her er hon. Tá eg spæli, man okkurt serligt fara at henda.( VG spælir eitt gandaljóð/ lag).

(Ljós niður á innara pall, myrkt, teppið av komfýri, so ljós upp á niðara palli)

P1: Munnu tær vera lidnar nú?

P2: Nei, tú etr so ótolin. Klokkan skal ringja fyrst.

P3: Ja ja, annars vera tær bleytar og keðiligar.

( klokkan ringir)

P1: So, hatta var tað. Eg sløkki bakarovnin.

P2: Ja, og eg lati hurðina upp... soleiðis....

P3: ...og eg taki tær út, ha...?

P1 + P2: Nei, eg vil sleppa....

P3: Aaalright, meeen sig mær, hvør av okkum er elstur? Hmmmm??

P1 + P2:(hyggja hvør upp á annan, yppa øksl) Tú, altíð tú.

P3: Tvætla, ikkilúnast nú..(tekur køkurnar út)..Hygg, tær eru akkurát passaligar....vita! (hinir býta í hvør sína)

P1+P2: Hmm, jú,jú.

P3: Ogsigi mær so hví tær eru so fínar(tóni), somen tí:(sangur)

SANGUR: Vit eru piparkøkumenn

NIÐURLAG: Vit eru piparkøkumenn, piparkøkumenn,piparkøkumenn.
Jólini eru nú í nánd, eru nú í nánd, í nánd.

1.Allir vættrar í hesum húsið
ja haraftrat hvør lítil mús,
skulu øll fáa okkurt søtt,
ja minst uppi ein stóran vøtt.

NL: (so ofta sum neyðugt, meðan teir býta út piparnøtir til øll).




VB5: Hatta var stuttligt.

VB1: Piparnøturnar smakka so væl.

VB2: Túsund takk góða vættragumma!

VG : Onki at takka fyri.Men nú má eg fara, um eg skal verða liðug áðrenn náttin fellur á. Kanska eg sleppi norðuraftur við borivogninum til Eiðis, teir bora næstan skjótari enn eg gangi, Gleðilig jól..

Vættrar: Gleðilig jól.

( tey arbeiða eina løtu)

VM :(við VP): Hvat hugsar tú um, yú sært so løgin út?

VP : Eg kom at hugsa um øll hesi holini í fjøllunum rundan um okkum.

VM : Ja,og hvat so?

VP : Hevur tú ikki hugsa um hini handan fjøllini?

VM : Handan fjøllini? Hvat situr tú og meylar um?

VP : Eg meyli ikki. Góða kona, veitst tú ikki at trøllini búgva handan fjøllini, og nú er hol ígjøggnum, so......

VM : So kundi hent at tey komu at vitja eisini

VB3: So sleppa vit at dansa trølla dansin aftur í ár, jubbiii!!

VM : Tigið.....eg hoyri okkurt....(sangur uttanifrá)

<u>SANGUR: Her koma trøllini</u>



Her koma trøllini, búgva handan fjøll.
Vættrar hoyri nú okkar rødd so hvøll.

VM: Hoyrið! Er hatta ikki trøllakvæðið eg hoyri?

VB 5: Kanska eru tað trøllini handan fjøll sum eru komin at vitja.

VB 4: Jú - hygg - har koma tey!

(Trøllini koma kvøðandi inn.Trøllabørnini halda í halan á hvørjum øðrum).

SANGUR: HER KOMA TRØLLINI:




1. Her koa trøllini, búgva handan fjøll.
   Vættrar hoyri nú okkar rødd so hvøll.
   Vættrapápi, vættramamma, vættrabørn øll,
   vit koma at gista í vættrana høll.

2. Trampus og Trumsa og øll barnatrøll.
   syngið ein trøllsang hvør trøllarødd so snjøll.
   Vættrapápi, vættramamma, vættrabørn øll,
   vit koma at gista í vættrana høll.

VB 3: Hey Trampus! Tað var gott at tit komu aftur í ár.

Trampus: Vit hildu, vit máttu koma ein túr at ynskja tykkum eini góð jól.

Trumsa: Tað er so langt síðan seinast. Hava tit tað gott?

VP: Ja, men vit hava úr at gera við at stákast til jóla.

Gamlatrøll: Tit treingja helst til at hvíla tykkum eina løtu. Skulu vit ikki fara upp á gólv og kvøða trøllakvæðið fyri tykkum?

Vættranar: JÚ!



SANGUR: DANSIÐ, KVØÐIÐ....




Dansið, kvøðið, syngið við ja komið sláið ring.
Trøll tey dansa altíð, tá tey halda jólating

(trællini dansa og kvøða- kanska føroyskan dans)

ella: Takt 1-2: ringur 8 fet til høgru
" 3-4: " 8 " " vinstru
" 5-6: trampa/ klappa
" 7 : hendur í hupp og snara runt
" 8 : Taka saman hendur- so umaftur.

(vættrar klappa)

VM: Tit skulu hava takk fyri. Nú fari eg at ynskja tykkum eini góð og hugnalig jól.

(trøllini fara av pallinum)

VB 2: Havið tað gott. Vóni vit síggjast aftur næstu jól.
(vættranar veittra).

VM: Nú man vera songartíð hjá smáum vættrum.

VP: Men tær stóru mugu vera uppi og hjálpa til við at bera gávur út.
(VP og stórar vættrar fara út við sekkjunum. VM og smávættrar fara at leggja seg).

PALLUR 4:

VB1: Halda tit at mýsnar fara at syngja fyri okkum í kvøld?
VM : Shhh, ja kanska, tit mugu vera pinnastill.
VB2: Eg hevði ikki vilja verið mús.
VM : Hví?
VB2: Handan fellan (peikar) sær so óhugnalig út.....(júst tá stingur ein mús trýnið undan).
M1 : Pip-pip (ella fýs,skavar á teppi ella trummuskinn) fniis! hehehehe.. handan fellan nyttaði ikki nógv.
M2 : Tú..(snoddar) luktar tað ikkiav nýbakaðum piparnøtun her? (allar koma inn og sneyta rundan um komfýrin).
M3 : Bíða....(sær vættrar) her liggur ein vættur (vættur letur eyguni aftur)
M1 : Skulu vit syngja hin...
M2 : Ja, Omma Ludvík...
M3 : Nei, for ólukkan, hetta er jú òli....
M1 : Jaja, men hatta er bara òli á Stykkinum. Nei kom nú, lati okkum syngja ein sang, so tær sovna og sova so fast, at vit sleppa at gnaga víðari.
M2 : Hvar er kontaktin? Far tú og sløkk (Mús 3 pilkar á vegginum og myrkt er)

Allar mýs syngja,bølamyrkt á pallinum,meðan tær ganga runt á gólvinum við lummalykt, syngja, kína og leggja at sova:

SANGUR: KVØLDARMYRKRIÐ FJALIR



Kvøldarmyrkrið fjalir nú alt,
krúpið til bóla - úti er kalt.
Sovið vættrar fittu sný.
Sovið - góða nátt.

(ljósini slókna, mýsnar fara av pallinum.Ein lítil mús hyggur inn aftur við lykt í hond)

Músin: Nú sova tey øll. Og í morgin, tá tey vakna, so er jólaaftan. - A sum eg gleði meg.
( músin fer út).



Týtt úr norskum

K. B.